**Tíðindastubbi 1: Bæði á heimasíðu og sum mail**

**Bókingar um ársskiftið**

**Fíggjarárið 2023**

Bókingar, sum skulu við í 12. tíðarskeið í 2023, skulu hava bókingardagfestingina 27.12.2023.

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin "GL Date" verða inntøppað "27.12.2023" (ella lægri, tvs. 1. til og við 27. desember 2023) ella "12-23".
- Í høvuðsbók skal í teiginum "Period" verða inntøppað "12-23".
- Aðrar góðkendar búskaparskipanir, sum senda inn upplýsingar via webservice, skulu brúka bókingardagfestingina 27. desember 2023.

Minnist til ikki at brúka dagfestingarnar 28., 29., 30. og 31. desember sum "GL Date".

Tá ið 12. tíðarskeið í 2023 verður latið aftur, boðar Gjaldstovan á heimasíðuni frá, hvussu skrásett tá skal verða uppá 1. ískoytisskeið 2023 (tíðarskeið 13-23).

**Fíggjarárið 2024**

Um ávísingar skulu bókast fyri fíggjarárið 2024, verður ein dagfesting í januar 2024 sett í teigin "GL Date", t.d. "05.01.2024".

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin "GL Date" verða inntøppað t.d. "05.01.2024" ella "01-24"
- Í høvuðsbók skal í teiginum "Period" verða inntøppað "01-24".

---

**Tíðindastubbi 2: bæði á heimasíðu og sum mail**

**Eyðmerking av skjølum, sum verða send Gjaldstovuni at skráseta**

Við ársskiftið 2023/202 er týdningarmikið, at stovnarnir týðiliga eyðmerkja skjølini, teir senda Gjaldstovuni at skráseta – tað veri seg lønarumbønir, kreditorfakturar e.a. – á rætta fíggjarár, ávikavist "2023" og "2024".

---